# EINAR FRAMKOMNAR FØROYAR

**Bústaðartrotið skal burtur**

Framsókn vil, at felagið Bústaðir skal seta meira ferð á bygging av leigubústøðum. Felagið skal harafturat uppraðfesta bygging av lestraríbúðum. Fólk, sum ikki frammanundan hava egnan bústað, skulu hava framíhjárætt á bíðilistanum.

Hundraðtals hús kring landið standa tóm uttan fastbúgvandi eigarar. Hesi somu, tómu hús fáa tænastuveitingar frá kommununum, sum tey fastbúgvandi gjalda fyri.

Framsókn vil, at heimild eigur at verða latin kommunum at taka eitt hóskandi gjald fyri tænastuveitingar til húsaeigarar, sum ikki rinda skatt í kommununi.

Skipanin við rentustuðli frá landinum ger sítt til at trýsta prísirnir uppeftir. Skipanin livir í stóran mun ikki upp til sítt endamál longur og eigur tí framyvir stigvíst at lækkast og avtakast. Hetta skal tó ikki raka verandi húsaeigarar.

**Føroyar skulu verða grønar og sjálvbjargnar**

Vit eru sannførd um, at Føroyar kunnu verða sjálvbjargnar í orkuframleiðslu. Elframleiðslan á landi fer øll at verða grøn, og menningin innan tøkni gongur nú so mikið skjótt, at um bert fá ár stavar øll orka til upphiting og flutning, bæði á sjógvi og landi, frá grønari orku.

Framsókn vil tryggja, at samtykti orkupolitikkurin, við 26 ítøkiligum átøkum, verður settur í verk og ikki bara verður føgur orð.

Framsókn vil við skatta- og avgjaldspolitikki stuðla undir, at bæði hvør einstakur borgari og vinnulívið velja grønar loysnir.

**Vælferðin skal framtíðartryggjast**

Eingin vælferð uttan starvsfólk. Verandi skipan ger, at tess meira tú arbeiðir, tess minni fært tú burturúr. Fólk skulu kunna arbeiða tað, ið tey vilja og megna, men skipanin skal tillagast soleiðis, at eingin lág- ella miðalløntur skal skattast eyka, fyri at arbeiða fulla tíð.

Dýr vælferð, er ikki tað sama sum góð vælferð. Hóast hundraðtals milliónir eru lætnar almannaverki og heilsuverki, fáa fólk ikki grundleggjandi vælferðartænastur. Framsókn vil gera neyðugar nýskipanir, sum tryggja, at vit fáa meira fyri hvørja krónu, og at okkara vælferð verður haldfør langt fram í tíðina.

## Sjálvberandi búskapar- og fíggjarpolitikkur

Vit í Framsókn eru av teirri sannføring, at grundhugsjónin undir øllum virksemi í Føroyum verður grundað á haldføri. Vantandi lógarverk á fíggjarøkinum letur í alt ov stóran mun upp fyri møguleikanum at føra ábyrgdarleysan fíggjarpolitikk. Framsókn fer at leggja fram uppskot um lógarverk, sum ítøkiliga kann bøta um støðuna.

Vit hava vaksandi inflatión. Hon rakar hart og keypiorkan minkar. Tí verður neyðugt at hjálpa teimum, sum koma ringast fyri. Vit vilja gera okkara fyri at tálma inflatiónini.

Framsókn vil, at niðurlagingin av ríkisveitingini verður løgd í eina fasta legu.

## Vinnuligt fjølbroytni á breddan

Vinnulívið skapar búskaparliga grundarlagið undir samfelagnum og skal sum høvuðsregla rekast í privatum høpi. Tað almenna skal avmarka sín leiklut mest møguligt, og høvuðsuppgávan er at tryggja, at vinnan er burðardygg og fjølbroytt.

Vit skulu altíð gáa væl um viðurskiftini í fiskivinnuni og alivinnuni sum høvuðsvinnur eins og um vinnuteyggjur kring tær. Somuleiðis hava tær samfelagsábyrgd í mun til útlutaða tilfeingið.

Vit í Framsókn síggja stórar møguleikar í m.a. KT-vinnu, filmsvinnu og maritimum vinnum. Hesar eiga at fáa bestu karmar at vaksa seg enn størri.

Vinnan hevur stóran tørv á arbeiðsmegi. Tí skal tað framhaldandi vera lætt at fáa arbeiðsmegi úr útlondum. Eisini mugu almennar skipanir, sum eru við til at skeikla arbeiðsmarknaðin, endurskoðast.

## Útbúgving og onnur førleikamenning í hásæti

Vit í Framsókn halda, at eitt vællært og upplýst fólk er grundleggjandi fyri eitt nútíðarhóskandi samfelag. Lærdómur og vitan eru somuleiðis bulurin í allari samfelagsmenning. Tí skulu yrkisútbúgvingar og bókligar útbúgvingar raðfestast.

Fróðskaparsetrið skal hava eitt nýmótans kampusøki, og fleiri viðkomandi útbúgvingar skulu setast á stovn. Umstøðurnar hjá lesandi og lærlingum skulu betrast og skulu vera kappingarførar mótvegis okkara grannalondum.

Lívlong læra skal vera sjálvsagdur partur av føroyska útbúgvingarpolitikkinum. Býtið við tímum og lærugreinum eins og floksstødd í Fólkaskúlanum má t.d. endurskoðast, og føroyskt undirvísingartilfar skal raðfestast á øllum stigum. Eitt serligt fokus má setast á føroyskt sum annaðmál.

**Samferðsla, útbygging og viðlíkahald fylgjast**

Vit í Framsókn vilja, at samferðslukervið framhaldandi verður útbygt. Samstundis sum vit víðka og byggja út, hevur tað avgerandi týdning, at vit halda tað viðlíka, sum longu er gjørt. Vit noyðast at gera eina samlaða ætlan fyri alla samferðslu í Føroyum.

**Mentan og kreativitetur skulu trivnast**

At liva í Føroyum hevur skapt og skapar støðugt okkara mentan, eisini so hvørt vit bjóða øðrum at vera vælkomin. Vit vilja hjúkla um føroyska mentan: tjóðararvin, spenandi gerandismentanina eins og professionella mentanarliga virksemið. Dømi eru matmentanin, fólkaminni, mál, nógvar listagreinar, søvn, ítrótt, handverk, hondarbeiði, sniðgáva eins og mangt annað, sum við Framsókn fáa eina kerliga hond, ein viðspælara og greið ambitiøs mál.

**Ferðavinna og umhvørvi hond í hond**

Vantandi karmar kring vinnuna hava givið avbjóðingar, sum hava ligið óloystar alt ov leingi.

Framsókn vil, at ferðavinnan skal hava fastar karmar. Javnvág skal finnast ímillum atlit til fólk, fæ, landbúnað, náttúru og upplivingar hjá ferðafólki. Soleiðis fáa vit eina ferðavinnu, sum vit kunnu liva av og liva við, kring allar Føroyar, alt árið.

Vit føroyingar skulu hava atgongd til okkara náttúru, men tað er eyðsæð, at øll kunnu ikki ganga allastaðni, allatíðina. Har vinnuligt virksemi fer fram í føroysku hagunum, skal tryggjast, at vinnuligi ágóðin eisini kemur festarum/jarðareigarum til góðar.

Ferðavinnan krevur íløgur um alt landið, bæði við atliti til samferðslu og náttúruvernd. Neyðugu íløgurnar skulu fíggjast av einum ferðavinnugjaldi/umhvørvisgjaldi, sum skal koma lokaløkjum til góðar.

Vit skulu sum skjótast seta í gildi eina náttúruverndarlóggávu.